# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Áarvegurin 1925 og 2005





*Myndin frá 1925: Forminnissavnið*
*Mynd frá 2005: Birgar Johannessen*

Sum tað sæst á hesum báðum myndunum, ið eru tiknar í ávikavist 1925 og í 2005, eru stórar broytingar hendar hesi 80 árini. Báðar eru tiknar oman eftir Áarvegnum, av Vaglinum og oman ímóti Kongabrúnni.

Á vinstru síðu stendur eitt hús eftir frá gamlari tíð, og tað er »Handelsforeningen«, í dag »Café Natúr«, bygt í 1892, og broytt í 1929. Tá lok var lagt á Havnará, frá Laðabrekku og oman á Kongabrúnna fingu húsini kvist á tekjuna og høvuðs-inngongdin bleiv flutt frá Kopargøtu og yvirum, móti Hotel Djurhuus.

Har sum húsini hjá Jákup á Lag standa í dag, stóðu tey gomlu húsini har Sápuhúsið helt til. Niðan fyri »Handelsforeningen« stóðu húsini »Grøna pakkhús« ella »Laðapakkhúsið«, sum tey eisini blivu rópt. Økið frá »Handelsforeningen« og oman á »Grøna pakkhús« bleiv rópt »Í tronganum«. Fara vit so til høgru, sæst »Hotel Djurhuus«, ið er so gott sum órørt. Oman fyri sæst »Áarstova«. Hon bleiv tikin niður síðst í 1920-unum.

Myndin frá 1925 er tikin trý ár eftir, at fyrsti bilurin kom til landið í 1922.

†

Góða mamma okkara, vermamma, omma, langomma og olduromma

**Jana Jensen**

ættað av Hellunum

andaðist á Lágargarði mánadagin 9. juni, 96 ára gomul.
Bønarhald verður á Lágargarði hósdagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Helena, Ruth og Jens Petur**

Tey, ið vilja minnast Janu, kunnu eftir hennara egna ynski lata Lágargarði eina gávu á kontu í peningastovni.

**Dagurin**
**12. juni. Basilius**. Helst til minnis um Basilius tann Stóra, sum var biskupur í Kesarea. Hann doyði í 379.






MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin